

## Havnar Arbeiðsgevarafelag valt nevnd

Jóhanna á Bergi, Eyðfinn Egholm og Hendrik Egholm eru nýggj í nevndini

Fríggjadagin var aðalfundur í Havnar Arbeiðsgevarafelag. Fyri vali stóðu Gunnar Mohr, Árni Joensen og Joel undir Leitinum. Hákun Djurhuus ynskti at taka seg úr nevndini. Joel undir Leitinum tók sum tann einasti við afturvali og var hann valdur. Afturat honum vórðu vald Jóhanna á Bergi, Eyðfinn Egholm og Hendrik Egholm. Nevndin í Havnar Arbeiðsgevarafelag sær sostatt soleiðis út: Høgni Hansen, Joel undir Leitinum, Jóhanna á Bergi, Eyðfinn Egholm og Hendrik Egholm. Nevndin hevur ikki skipað seg.



*Tað eru ikki bara nótaskipini og kraftblokkaskipini, ið hava tað trupult við at fáa raksturin at hanga saman á ídnaðarveiði. Spurningurin er, hvussu leingi upsaveiðan við troli verður lønandi*

Mynd: Vilmund Jacobsen

# á sildaveiði

ka størri nøgdir, men hesar vóru ikki til steðgar, tá skipini í felag góvust at fiska.

Stjórin ásannar, at tað er álvarsamt, tá tað ikki longur loysir seg at fiska.

- At skipini kollektivt gjørdu av at gevast, hevur eisini nakað við tað at gera, at tey fiska av felags svartkjaftakvotu, leggur hann aftrat.

Tað eru sjey nótaskip og tvey ídnaðarskip, sum eiga hesa kvotu.

Jógvan Jespersen veit at siga, at prísirnir á ídnaðarfiski eisini hava verið lágir í eitt nú Noregi, so tað er ikki bara í Føroyum, at hesir prísir eru lækkaðir.

Vit spurdu eisini stjóran í Felagnum Nótaskipum, um útlit eru til, at tað fer at loysa seg hjá skipunum at fara eftir svartkjaftakvotuni, sum eftir er, seinni í ár.

- Tað er ómøguligt at siga í løtuni, soleiðis sum prísgongdin á oljuni er. Hetta veldst sjálvsagt eisini um fiskiskap og avreiðingarprís, leggur hann aftrat.

## Nót – síðan trol

Sum Sosialurin hevur skilt í morgun, eru flestu føroysku nótaskipini og kraftblokkaskipini á sildaveiði norðarliga í íslendskum sjógvi.

Skipini, sum hava nót, royna við nót, meðan kraftblokkaskipini, Carlton og Næraberg, eru farin at trola.

Vit hava eisini skilt, at eingi ár eru eins, men sum summarið gongur, og sildin gerst styggari, plaga øll skipini at partrola, sum eisini sparir teimum ein part av oljuútreiðslunum.

Saksaberg hevur verið á sild í eina tíð, og 23. mai landaði skipið 280 tons av sild í Noregi. Teir seldu fyri 2,64 norskar krónur í miðal fyri kilo. Saksaberg, sum eisini hevur roynt eftir sild í føroyskum sjógvi, er nú aftur á sildaleiðunum norðanfyri.

## Bílig fiskasløg

Tann stóri spurningurin í føroyskari fiskiskipavinnu er, hvørji fiskasløg lønandi verður at fara eftir, sum oljuprísirnir hækka.

Sum formaðurin í Felagnum Nótaskip sigur, er neyðugt við stórum nøgdum, tá roynt verður eftir teimum bíligaru fiskasløgunum – og ikki minst teimum, sum landað verða til ídnað.

Heldur gongdin í oljuprísunum fram, er tað ein stórur spurningur, um tað yvirhøvur fer at loysa seg at fiska svartkjaft yvir longri tíðarskeið. Hugsandi er, at vertíðin verður styttri, enn hon hevur verið, tí lønandi rakstur bert fer at fáast í vinnuna, tá svartkjaveiðan er best.

Ein annar stórur spurningur er, hvussu verður við trolveiðini eftir upsa, sum tíðin gongur, og oljuprísurin heldur fram at veksa.

Hetta eru týðandi spurningar, ið kunnu koma at hava stóra ávirkan á framtíðina og samansetingina av okkara fiskiskipaflota.

Toskurin, sum er dýrur fiskur, hevur verið illa fyri seinnu árini, meðan upsin, sum er ein nógv bíligari fiskur, hevur verið støðugur og samstundis verið grundarlagið undir meginpartinum av okkara partrolaraflota – og partvíst okkara djúpvatnstrolarum.

Hugsandi er, at tað kann gerast rættiliga trupult at venda gongdini í okkara ísfiskavinnu, so leingi toskurin ikki í nógv størri mun gongur innaftur í fiskiskapin.